HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

**Mannagongd at útfylla og senda heilsuváttan til Heilsufrøðiligu starvsstovuna**

1. Heilsuváttanin er á heimasíðuni www.hfs.fo, undir heilsuváttanum. Útfyll hana og send avstað við "send" knøttinum.

   Minnst til at seta eitt eintýðugt nummar sum tú velur og stýrir í felti Exporters ID No.:
   Hetta er fyri at viðskiftarin og Heilsufrøðiliga starvsstovan hava eina eyðmerking at halda seg til, tá ið nógvar heilsuváttanir eru í umfari.

2. Eftir at tú hevur trýst á "send" knøttin, verður váttanin heintað inn í eitt teldubræv, og har kanst tú skriva, hvørjar fylgiváttanir tú ynskir við váttanini, hvussu hon verður heintað o.s.fr. – minst til at seta telefonnummar her, so lætt er at fáa fatur á tær, um okkurt er at spyrja um.

3. Tað skal bert ein váttan við møguligum fylgipappírum sendast í hvørjum telduposti.

**Eftirlit**

4. Heilsufrøðiliga starvsstovan eftirkannar *, skrásetir í journalskipanini og skrivar referancunummar á váttanina, og

   útskrivar váttanina á forprentað brævpappír við vatnmerki í.

5. Tá heilsuváttanin er skrásett, upplýsingarnar eftirhugdar, útflutningseftirlit** gjørt - og Heilsufrøðiliga starvsstovan er sannførd um, at allar upplýsingar eru sannar – verður váttanin undirskrivað og stemplað, og er nú klár at heinta.

**Russland:** Váttanin verður send við telduposti til Rosselkosnadzor.

6. Váttanin skal fylgja fiskinum allan vegin fram til móttakaran / verða í móttakaralandinumtá fiskurin kemur har.

** **Upplýsingar, sum møguligt er at eftirkanna eru:** Vøruslag, navn, adressa og løggildingarnummar hjá framleiðaranum, um virkið útflytir tað, virkið hevur løggilding ti og temperaturl.*

***Møguligt er ikki hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni at eftirkanna**, um nettovekt, navn og adressa á móttakara o.s.fr.er rætt - hetta eru upplýsingar, sum útflytarin ábyrgdast mótvegis Heilsufrøðiligu starvsstovuni fyri eru sannar. Umráðandi er at fáa hesar upplýsingar rættar, áðrenn váttanin verður undirskrivað, til tess at alt skal ganga smidliga fyri seg.*

**RUSSLAND:** *eftirkannað verður at móttakarin er á virkisins lista yvir innflytarar í Russlandi.*

*Tá ið fiskurin er farin farin av landinum,er meginreglan, at Heilsufrøðiliga starvsstovan ikki kann broyta váttanina, tí nú hava vit ongan møguleika at kanna, um broytingarnar eru sannar. Í ávísum førum kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta eina váttan, um broytingin er av slíkum slag, at hon ikki viðvíkur vøru - eitt nú stavivillur ella nýggjur móttakari.*

*Heilsufrøðiliga starvsstovan undirskrivar ikki nýggja váttan, fyrrenn originalurin av undirskrivaðu váttanini er okkum í hendi. Tað er bert møguligt at broyta eina heilsuváttan í tíðarskeiðnum, sum tað tekur at flyta fiskin til móttakara, áleið eini 10 dagar, og tá bert, um vit fáa originalin aftur.*

***Tað er umráðandi at boða frá í góðari tíð, tá fiskur fer av landinum, so útflutningseftirlitið kann gersat ímeðan komandi er at fiskinum.*

**Rokning:**
Verður send tí sum stendur sum exporter/consignor, um ikki verðu biði um annað í hvørjum einstøkum førið.Á rokningini verður referansunummar og Exporters ID.

**Falkavegur 6. 2nd floor, FO-100 Torshavn • Tel.: +298 55 64 00 • Fax: +298 55 64 01 • hfs@hfs.fo • www.hfs.fo**